# Niels Petur seymaði klæ
# fyri Mærsk McKinny Møl

**Staddur í Keypmannahavn í seinasta mánaða var avrátt at fara at vitja Niels Petur Vang, ættaður av Sevmýri á Tvøroyri. Hann hevur havt eina serliga lagnu. Hann er ein av teimum mongu føroyingum, sum fóru sum børn til Danmarkar vegna brek, og sum bleiv verandi í Danmark**

## Lagnusøga



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Niels Petur var elsta barnið hjá Palla Vang av Hamri í Froðba og konu hansara Anna, ættað úr Sandvík. Hann er føddur 21. mai 1937.

Hann var bert eitt ára gamal, tá ið hann fekk polio ella barnalammilsi, sum tað kallaðist, tí sjúkan rakti mest børn og ung. Tey flestu blivu frísk av hesi sjúku. Summi vórðu lammað. Hjá helvtini av hesum hvarv lammilsið aftur, meðan hin helvtin í størri ella minni mun gerst varandi lammað. Í ringasta fall er sjúkan deyðilig. Polio var vanliga ein umfarssjúka, og samstundis við Niels Petur vóru tað onnur í Føroyum, sum fingu sjúkuna sum Jan og Alexandra úr Fuglafirði, Per og Elmar úr Oyndarfirði og Petra úr Klaksvík

Tað var ikki fyrr enn í 1953, at Jonas Salk uppfann eina vaksinu móti polio.

### Misti mammuna fimm ára gamal

Niels Petur var illa sjúkur av polio og var líka við at doyggja. Hann gjørdist lamin í báðum beinum og kundi bert flyta seg við hjálp av tveimum stavum. Seinni fekk hann skinnarar og eina trýhjólaða avlamissúklu, inntil hann sum 18 ára gamal, hjálptur av pápanum, fekk koyrikort og avlamisbil.

Niels Petur fekk tvey yngri systkin, Dánjal og Anna. Men mamman doyði bert 32 ára gomul í november 1942 nakrar mánaðir eftir, at Anna var fødd. Tískil gjørdust Niels Petur 5 ár, Dánjal 2 ár og Anna 3 mánaðir móðurloysingar.

Niels Petur og Anna fóru til ommuna og abban á Hamri í Froðba, og Dánjal fór til ommuna og abban í Sandvík. Har fingu øll trý umsorgan og kærleika frá familjum teirra og øðrum.

Anna varð verandi í Froðba hjá ommuni, abbanum, pápasystrum og pápabeiggjum, og vaks hon upp undir góðum og tryggum korum. Øll vóru góð við hana, og ber hon teimum alt gott.

Mamma Niels Petur segði, at tá ið Niels Petur rakk skúlaaldur, so ætlaði hon sjálv at bera hann til og frá skúla. Av landinum skuldi hann ikki, men so skuldi ikki verða.

Spurningurin var eisini, hvørjir møguleikar vóru fyri ein drong við einum slíkum breki í Føroyum.

### Heim at ferðast eina ferð árliga

Eftir kríggið fóru Palli og Niels Petur niður við fiskiskipinum



Niels Petur sum skraddari

"Norðfarinum". Tað var ringt veður, og ferðin tók heilar áttta dagar. Alla hesa tíð mátti Niels Petur liggja í koyggjuni, tí uppi kundi hann jú ikki vera.

Komin til Danmarkar varð Niels Petur innlagdur á Ortorpedisk Hospital á Hans Knudsens Plads í Keypmannahavn. Her var hann í tveir mánaðaðir.

Ein dag mátti Palli so fara heim aftur. Niels Petur átti eina fastur í København, nevnd Diddan. Hon kom at verða honum ein hollur og góður stuðul í mong ár.

Hann flutti inn á Hjemmet for Vanføre á Toldbodvej. Her fekk hann sjey ára skúlagongd á heiminum. Hetta var hart at byrja við. Hann dugdi jú ikki málið, og matin dámdi honum heldur ikki. Hann letur kortini væl at at vera á heiminum. Til Føroya slapp hann í summarfrítíðini. Á jólum plagdi hann at fara heim við einum donskum kammerati.

Dánjal, beiggin, greiðir frá, at tað var rættuliga veitslukent, tá ið Niels Petur kom heim at ferðast. Flaggið var eisini í húnar hátt. Øll gjørdu tað, tey kundu fyri, at hann skuldi fáa eina góða tíð í Føroyum. Hann kundu ikki sparka fótbólt, men hann kundi vera málmaður. At hann so eisini brúkti stavarnar, varð bert góðtikið.

Teir plagdu at fara til Sandvíkar at ferðast til ommuna og abban har. Har fóru teir at fiska síl, og tá plagdi Dánjal, Steinbjørn systkinabarnið og aðrir dreingir at bera hann á bakinum.

Niels Petur dámdi væl í Froðba, í Sandvík og á Sevmýri, tí øll vóru góð við hann og vóru hjálpsom. Enn spyrja fólk eftir honum – tey hava ikki gloymt hann.

Tá ið Niels Petur so skuldi fara niður aftur, fór pápin í hagan eftir einum lambi, so Niels Petur kundu fáa rættuligan føroyskan mat, áðrenn hann fór avstað aftur. Niels Petur kundi eins og onnur børn gera okkurt skeivt. Hjá øðrum hevði hetta ført til fleingju. Men Niels Petur skuldi ikki fleingjast. Pápin helt, at Niels Petur hevði mist nóg mikið, so hann setti seg undir Niels Petur, tók um hann, mussaði hann og sang fyri honum, og eftir eina lítla løtu varð alt í lagi.



Niels Petur fekk hóast brek eitt gott lív

### Vanførehjemmet

Vanførehjemmet var úrslit av eldsálum, sum hava viljað gjørt nakað fyri fólk við likamligum avmarkingum. Ein av hesum var Johanne Petersen (1847-1922), sum gjørdist ein kendur leiðari á heiminum. Hon var sjálv likamliga veik. Hon gjørdist í 1874 leiðari fyri ein húsgerningsskúla, sum var knýttur til klinikkina fyri "vanføre og lemlæstede". Knýtt at hesum skúla kom eitt skúlaheim, ein kvøldskúli, ein skúladeild og eitt sanatorium.

Hennara mál var at geva øllum likamliga skerdum eina slíka praktiska útbúgving, so tey skuldu kunna klára seg uttan hjálp frá øðrum. Tey skuldu kunda kenna seg sum sjálvstøðug menniskju.

Á heiminum búðu eisini fýra aðrir føroyingar, sum eisini høvdu havt polio. Ein av teimmum var Per Gaard úr Oyndarfirði. Hann greiðir frá, at Niels Petur var góður telvari. Hann plagdi at fara yvir í Fælledparken at telva við teir eldru har. So ungur sum hann var, varð hann tikin í álvara av teimum.

Ein annar oyndfirðingur var Elmar Abrahamsen. Hann og konan Birgit gjørdust sera íðin í bogaskjóting og skipaðu fyri kappingum millum likamliga brekað í hesi ítróttargrein. Hann endaði eisini við at gerast heimsmeistari á hesum økinum.

### Gjørdist skraddari hjá hr. Møller

Nú skúlagongdin var liðug var spurningurin um, hvat Niels Petur nú skuldi fara at gera.

Pápin vildi hava sínar synir at taka eina bókliga útbúgving, og hann helt, at Niels Petur skuldu fara á skrivstovu. Men tað vildi hann ikki. Tað vóru ymisk hondverk at velja millum á heiminum, og Niels Petur valdi at gerast skraddari. Hann fór at